# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Tórshavnar alfrøði:

## Konfirmantar í 1912

Hesir 13 konfirmantarnir vórðu fermdir tann 11. februar 1912: Johanne Udbø (Havn), Anna Maria Christiansen (Havn), Valborg Petersen (Havn), Josefine Magnhild Samuelsen (Havn), Andreas Albert Arge (Havn), Daniel Jacob Frederik Joensen (Havn), Zakarias Joensen (Argjaboga), Petur Sigfred Hansen (Havn), Niels Victor Frits Christiansen (Havn), Andreas Sofus Frederik Clementsen (Havn), Ferdinand Rubeksen (Havn), Hans Christian Arge (Havn), og Niels Holm Mortensen (Havn).

Vit kenna bert tveir dreingir á myndini, teir eru: fremst uttast til høgru situr Niels Victor Frits Christiansen (Frits Klokkarin), og drongur nr. 3 frá høgru á aftasta rað er Niels Holm Mortensen.

Um onkur av lesarum okkara kennist við persónar á myndini, verða tey vinarliga biðin um at ringja til Birgar Johannessen á tel. 314647 ella 214647, so vit kunnu fáa tey røttu nøvnini til teir røttu persónarnar.





## Hvørjir eru hesir?

Ein lesari hevur biðið Sosialin prentað hesa myndina og biðir okkum hjálpa sær at finna út av, hvørjir hesir tríggir ungu menninir eru.

Myndin er tikin umborð á vestmannatrolaranum, Kap Farvel í umleið 1968/1969.

Lítil ivi er um, at tað er Birgir Sivertsen úr Klaksvík, sum stendur ytst til vinstru, men ivi er um hinar báðar menninar.

Lesarar, sum vita um menninar at siga, kunnu ringja á tlf. 221577.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

**Dagurin**

**21. oktober. 11.000 moyggjar.** Halgisøgurnar siga frá, at ein kongsdóttir úr Bretagne, Ursula av navni, varð trúlovað enskum kongssyni. Tey gera av at hittast í Køln, men fyrst skal hon gera pílgrímsferð til Rom. Hon fer avstað, og henni fylgja 11.000 moyggjar – men hetta talið er helst skrivað skeivt fyri 11 moyggjar. Tá ið tær skulu fara til Køln, legði ein heiðin skari av Húnalondum eftir teimum, og teir neyðtóku tær og drupu tær. Í fyrsta umfari var Ursula spard, men tá ið hon ikki vildi lovast heidna húnakonginum, fekk hon somu lagnu.

*A.C. Evensen doyði hendan dagin í 1917*

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at

**Danvør Bay,**
**fødd Joensen,**
**frá Gjógv**

andaðist í Herlev fríggjadagin 14. oktober,
76 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Herlev kirkju
fríggjadagin 21. oktober kl. 11.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Poul Johannes og Hans Jacob Joensen**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum mongu,
sum sýndu samkenslu tá okkara kæra mamma,
omma, langomma og vermóðir

**Anna Sofía Daniella Eikhólm**

doyði og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir
og øllum tykkum, sum á ymiskan hátt
hjálptu til við jarðarferðini.
Eisini ein tøkk til starvsfólkið á Ellisheiminum í Vágum
fyri ta tíðina tit vóru um mammu.
Hjartaliga takk øll somul.

**Tummas, Elinborg, Haldis, Petur, Regin, Arnleyg og Guðny v/ familju**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt vístu
samkenslu og hjálptu til, tá ið okkara elskaða kona,
mamma, vermamma, omma og langomma

**Daisy Elttør**
Klaksvík

andaðist og fór til gravar.
Tøkk til Klaksvíkar sjúkrahús, deild M.
Tøkk til Landssjúkrahúsið, B7.
Tøkk til tykkum, ið stuðla hava
Føroya felag móti krabbameini.
Tøkk til talara, organist, førara av líkbili og gravara.
Tøkk øll somul.

Gud vælsigni tykkum øll.

*Familjunnar vegna*
**Knút, Eyðfinn, Helgi og Margitt**